SPINNING
AEROBIC
BALLETT

*Kom væl inn í tað nýggja árið og leggið leiðina inn í YNDI. Har kunnu tit fáa øll møgulig sløg av kropsvenjingum. Instruktørarnir eru »fit for fight« við tí nýggjasta innan aerobic, spinning, trimming og step, aftaná at hava verið á skeiði alt vikuskiftið.*

**Start 8. januar – slutt 7. apríl**

SPINNING

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 18:00 – 18:55 Vand - Eyðun | 12:00 – 12:50 Spinn - øll Evald | 19:00 – 19:55 Spinn - vand Eyðun | 12:00 – 12:50 Spinn - øll Tórhalla |
| 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Ingrid | 17:00 – 17:55 Spinn - øll Ann | 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Kirstin | 16:00 – 16:55 Spinn - øll Ann |
| | 19:00 – 19:55 Spinn - byrjarar Gunnar | | 17:00 – 17:55 Spinn - byrjarar Evald |
| | | | 18:00 – 18:55 Spinn - vand Evald |

AEROBIC

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:15 – 18:30 Aerobic - vand Tórhalla/Kristin | 16:00 – 17:00 Trimmari - øll Tórhalla | 17:15 – 18:15 Low - kvinnur Oddvør | 15:00 – 16:00 Trimmari - øll Tórhalla/Ingrid |
| 18:30 – 19:30 Trimmari - øll Kristin/Tórhalla | 20:00 – 21:00 Rygghold Anna Maria, fysioterapeutur | 18:15 – 19:30 Stepp & Styrki øll Kirstin | 19:00 – 20:00 Aerobic - byrjarar EB |
| 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Ingrid | | 19:30 – 21:00 Trimm & Spinn Kirstin | |
| | | 20:00 – 21:00 Aerobic - menn EB | |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

| | | Skúlanæmingar |
|---|---|---|
| 1 tími um vikuna: | 470 kr. | 20% avsláttur |
| 2 tímar um vikuna: | 770 kr. | 20% avsláttur |
| 3 tímar um vikuna: | 990 kr. | |

TRIMM & SPINN er serliga ætlað teimum, ið vilja sleppa av við fita og at stramma seg upp aftur. Hetta er eitt lið, ið øll kunnu verða við.

SPINNING Leggið til merkis: Nú er møguleiki at spinna í døgurðatímanum!

RYGGHOLD Hevur tú trupulleikar við rygginum, so er hetta eitt hold fyri teg. Undirvísari er Anna-Maria Joensen, fysioterapeutur.

Sosialurin - 311820

BALLETT

Dansað verður til 9. mai

| Týsdag | Hósdag |
|---|---|
| 17:00 – 18:00 6-8 ár Tóra/Vígdis | 16:00 – 17:00 11-12 ár Rannvá |
| 18:00 – 19:00 Vaksin Rannvá | 17:00 – 18:00 9-10 ár Tóra/Vígdis |
| 19:00 – 20:00 13-16 ár Rannvá | 18:00 – 19:00 Vaksin Rannvá |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

Eina ferð um vikuna:

| 6-12 ár | 13 og eldri |
|---|---|
| 450 kr. | 490 kr. |

Tvær ferðir um vikuna:

| 6-12 ár | 13 og eldri |
|---|---|
| 450 kr. | 790 kr. |

Hugsar tú um ♥, LUNGU ella tína vælveru sum heild, so kom út í Yndi!



YNDI
v/ *Elsa Maria Bærentsen*

Ringið og tryggið tykkum pláss ella møtið til tíman.
Tlf. nr. eru:
**310025, 317671, 421095 og 312868**

**Yviri við Strond 21**
**FO-100 Tórshavn**
e-mail: yndi@post.olivant.fo



## Próvdómari

Á Koyrikortsdeildini á Bileftirlitinum, er eitt starv sum próvdómari í koyrikortsmálum leyst at seta skjótast gjørligt.

**Starvslýsing:**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- fyriskipan av koyriroyndum
- próvdøming av ástøðis og verkligum koyriroyndum
- dagføring og tilrættaleggjan av próvtilfari
- dagføring og tilrættaleggjan av frálærutilfari
- dagføring av lógum og kunngerðum á koyrikortsøkinum v.m.

**Førleikakrøv:**
Tann sum settur verður í starvið, skal:
- hava góð samstarvsevni
- hava evni og áhuga at arbeiða við fólki
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- kunna taka sjálvstøðugar avgerðir
- helst hava royndir innan frálæru og námsfrøði
- helst hava kunnleika til ferðslulógarøkið

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.
Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Bjarna Sørensen, deildarleiðara ella Jákup Jacobsen, stjóra á tlf. 350 400.
Umsóknir saman við prógvum, starvsroyndum og viðmælum skulu vera Bileftirlitinum í hendi í seinasta lagi 10. januar 2001.

**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Stovnurin er skipaður í 3 deildir. Umframt høvuðssæti í Tórshavn, hevur stovnurin sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 17 fólk.



## Bátur til sølu

15,3 tons, fiskiloyvi 4A, alla nautiska útgerð, 5 automatiskar snellur og línureiðskap.

**Tlf. 424413**



## Til sølu

Videoútleiging, nógvir filmar o.a. bíliga til sølu.
Áhugað skrivið til:

Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 04.01.



NORA

Nordisk Ministerråd

## Skrivstovuleiðari
### Norrønt Atlantsamstarv, Nora

Á skrivstovuni í Tórshavn verður starvið sum skrivstovuleiðari leyst 1. mars 2001.

**Arbeiðið** fevnir serliga um:
- Tøkniligar/búskaparligar metingar av umsóknum um stuðul.
- Samband við teir leiðslubólkar, sum standa fyri verkætlanunum, sum eru í gongd.
- At taka stig til at seta nýggjar verkætlanir í gongd út frá langtíðarætlanini hjá NORA.
- Seta avgerðir hjá NORA nevndini í verk.
- Hava yvirskipaðu ábyrgdina av umsitingini mótvegis NORA nevndini og Norðurlanda Ráðharraráðið.

**Førleikakrøv:**
- Innlit í og kunnleika um vinnulív og vinnugrundarlag í Norrøna Atlantsøkinum.
- Hægri útbúgving og viðkomandi royndir frá arbeiði við verkætlanum.
- Eggjandi og góð samstarvsevni.
- At duga at samskifta bæði skrivliga og munnliga á skandinaviskum og enskum.

**Setanartreytir:**
Sáttmáli verður gjørdur fyri upp til 4 ár við møguleika fyri at leingja. Setanarviðurskiftini eru annars sambært galdandi føroyskum reglum. Løn eftir førleika og royndum og eftir avtalu við yrkisfelagið hjá søkjaranum. Setanarstaður er skrivstovan í Havn. Arbeiðið ber í sær nakað av ferðing.

**Umsóknarfreist:**
23. januar 2001.

**Umsókn:**
Umsókn á skandinaviskum við upplýsing um førleika, skjalprógvan av týðandi próvtøkuúrslitum og C.V. verður stílað til:

**NORRØNT ATLANTSSAMSTARV**
att.: verkætlanarsamskipari Lis Hammer
t-bræv: lis@nora.fo
Bryggjubakki 12
Postbox 259
FO-110 Tórshavn
Heimasíða: www.nora.fo

**NORRØNT ATLANTSSAMARBEJDE, NORA,** er eitt økissamstarv undir Norðurlanda Ráðharraráðnum, sum fevnir um Grønland, Ísland, Føroyar og Strandanoreg. Endamálið er at styrkja og stuðla upp undir vinnumenning. Nýggj langtíðarætlan fyri árini 2001–2006 leggur dent á beinleiðis samvinnu millum vinnufyritøkur í teimum 4 londunum og nýskapan innan allar vinnugreinar við at fáa til vega sambond millum vinnufyritøkur og granskingar- og menningarumhvørvini í Norrøna Atlantsøkinum.
Fyri samstarvinum stendur ein nevnd við 3 limum úr hvørjum limalandi. NORA arbeiðir undir Norðurlanda Embætismannanevndini fyri Økispolitikk undir Norðurlanda Ráðharraráðnum. NORA fer í næstum at taka upp samstarv við INTERREG III B samstarvið **Northern Periphery**, sum umframt NORAlondini, fevnir um Skotland, Svøríki og Finnland.


Lesið Sosialurin -tað loysir seg


# ítróttir

Nr. 2 • hósdagur • 4. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# Rumenar byggja nýtt lið

**Daniel Rápa, sum hevur gott innlit í bæði rumenskan og føroyskan hondbólt, sigur, at hóast rumenar nú byggja eitt nýtt lið, so verður uppgávan hjá føroyska liðnum stór**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at landsliðsarbeiðið í hondbólti hevur verið í dvala síðani seinast í áttatiárunum, hava vit nú aftur fingið flaggskipið upp at standa, og einki er at taka seg aftur í, at hetta er harðliga tiltrongt hjá bæði leikarum og áskoðarum.

Kvinnurnar hava longu fingið sín elddóp, og hóast hesin varð samansettur av tveimum tapum móti Svøríki, so sýndu okkara í løtum, at tilfarið at byggja víðari á so avgjørt er til staðar.

### Nú verður verri

Menninir hava longu leikt fyrstu dystir sínar, men hóast hesin elddópurin eisini var væl eydnaður, so kemur fyrsta veruliga styrkisroyndin ikki fyrr enn nú, tá teir trý vikuskifti á rað skulu royna seg móti hondbóltstjóðum, sum á pappírinum eru væl sterkari enn okkara lið. Rumenia, Sveis og Litava tykjast í øllum førum sterkari enn Grønland, hóast grønlendingar nú fyri fyrstu ferð skulu royna seg í HM-endaspæli.

Fyrsta mótstøðuliðið av hesum verður sum kunnugt Rumenia. Vanliga teljast eystureuropeisk lið millum tey sterkastu í heiminum, og hóast rumenia nú er í ferð við at byggja eitt nýtt lið upp, so er einki at ivast í, at talan er um eitt sera sterkt lið.

Rumenia hevur í fleiri ár talst millum heimsins sterkastu tjóðir, tá yngru landsliðini hava roynt seg, og tað eru í stóran mun leikarar frá hesum liðum, sum nú manna rumenska liðið.

### Sterkt lið

Tá tað ræður um at finna upplýsingar um eystureuropeisk lið, er ofta ein trupulleiki at fáa fatur á røttu persónunum, og í so máta er rumenska liðið einki undantak. Hinvegin eru vit føroyingar júst í hesum føri somikið hepnir, at vit í nøkur ár hava havt eitt rumenskt hondbóltspar í landinum, og vit hava eisini sett okkum í samband við hesi, fyri at vita, hvønn kunnleika tey hava til rumenska landsliðið.

Talan er sjálvandi um Daniel og Ioana Rápa, sum hava búleikast í Vestmanna seinasta árið. Umframt at hava verið virkin innan VÍF, hava tey eisini arbeitt innan hondbóltssambandið, har Daniel er hjálparvenjari á landsliðnum.

Um rumenska liðið sigur Daniel, at hetta er eitt lið við eyðkendu eystureuropeisku dygdunum.

Víðari sigur hann, at talan er um eitt lutfalsliga nýtt lið, men at talan kortini er um leikarar við nógvum royndum.

- Allir spælararnir spæla so í bestu rumensku deildini, og felags fyri fleiri er, at teir spæla við Steua Bucharest, sum verður mett sum sterkasta liðið í kappingini har, sigur Daniel.

Sjálvur hevur Daniel spælt saman við onkrum av spælarunum í fleiri ár, og tí kennir hann eisini eitt sindur til einstøku leikararnar. Um hesar sigur hann, at tikið yvir ein kamb, er talan um eitt sterkt lið.

- Teir hava góðar og skotsterkar bakkar, sterkan strikuspælara og nakrar skjótar vongspælarar, so talan verður í øllum førum um eina trupla uppgávu.

### Gera sítt besta

Tá vit síðani tosa um, hvørji mál føroyingar skulu seta sær, ella hvat áskoðararnir skulu vænta sær av liðnum, er Daniel tó ikki so hugaður at seta sær nakað ávíst mið.

- Fara vit út við tí hugburðinum, at munurin millum liðini er so og so stórur, so er einki at ivast í, at vit tapa stórt.

- Heldur eiga vit at fara út við tí fyri eyga at gera okkara besta. Í útgangsstøði er møguleikin í einum landsdysti 50/50, og so er at fara út at gera sítt besta, er einasta viðmerkingin, sum Daniel hevði til hendan seinasta spurningin.

Rumenski hópurin kemur annars til landið í dag, og framgongur hesin aðra staðni á síðuni.

Føroyski hópurin er enn ikki endaliga úttikin. Tá vit mikumorgunin tosaðu við landsliðsvenjaran, Palla Joensen, var enn okkurt einstakt ivamál, men mikukvøldið roknaði hann við, at alt skuldi verið klárt í so máta.



*Daniel Rápa hevur sjálvur verið liðfelagið við onkrar av rumensku landsliðsleikarunum, men um vikuskiftið verða teir í hvør sínum parti*

## Rumenski hópurin

1. LAUFCEAC Stefan
2. DRAGOMIR Florin
3. BARZA Sorin
4. MIHAILA Ovidiu
5. COSTEA Valeriu
6. GABREAN Ion
7. MURARU Mircea
8. FORTUNEANU Rares
9. PETREA Adrian
10. LUCA Florin
11. PURCAREA Dorin
12. ROSCA Ion
13. FILIP Marian
14. COJOCEA Mihai
15. NICA Cezar Paul
16. MUNTEANU Nicolea
17. POPESCU Traian
18. RADOI Dan
19. DRAGANESCU Remus

# Eitt stig aftur

**Føroyar eru nú nummar 117 á styrkislistanum hjá altjóða fótbóltssamgonguni, FIFA**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í mun til ársbyrjan er talan um eina afturgongd upp á fimm pláss. Tá vóru Føroyar nevnliga á 112. plássinum á listanum. Í mun til november er talan um eina afturgongd upp á eitt pláss.

Styrkislistin hjá FIFA verður uppgjørdur eina ferð um mánaðin, og eins og vanligt er Brasilia á odda, meðan Frakland er nr. 2.

Sterkasta norðanland er framvegis Noreg, sum er at finna á einum 14. plássi. Hetta er tó væl lakari enn fyri ári síðani, tá Noreg var á sjeynda plássinum. Heldur ikki hjá Danmark og Svøríki hevur árið hilnast serliga væl. Tey eru nú jøvn á 22. plássi, eftir at tey við ársbyrjan vóru ávíkavist nr. 11 og 16.

Niðanfyri verða sterkastu londini og norðanlondini listað í styrkisrøð, og í klombrum er viðmerkt, hvar liðini vóru at finna í november mánaði.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Brasilia | (1) |
| 2 | Frakland | (2) |
| 3 | Argentina | (3) |
| 4 | Italia | (5) |
| 4 | Kekkia | (4) |
| 6 | Portugal | (7) |
| 7 | Spania | (6) |
| 8 | Holland | (10) |
| 9 | Jugoslavia | (9) |
| 9 | Paraguay | (12) |
| 14 | Noreg | (14) |
| 22 | Danmark | (24) |
| 22 | Svøríki | (22) |
| 50 | Ísland | (49) |
| 59 | Finnland | (55) |
| 117 | Føroyar | (116) |